LM-068/2022

Fylgiskjal 12

the Faroe Islands

Tórshavn 06.09.2021

Hoyringssvar frá Visit Faroe Islands til uppskot til logtingslóg um náttúruvernd

Ferðavinnan í Føroyum er á einum vegamóti. Tað eru politisku avgerðirnar, ið nú liggja fyri framman, ið fara at gera av, um vit kunnu menna eina burðardygga og væl skipaða ferðavinnu í Føroyum ella ikki. Visit Faroe Islands hevur leingi víst á torvin at fáa lógarkarmar, ið skipa virksemið í føroysku náttúruni. Vit hava onga veruliga lendislóggávu og onga náttúruverndarlóggávu, og vit hava heldur onga lóggávu, ið skipar frítíðar- og ferðavinnuvirksemið í náttúruni. Tað er tilvildin, ið ræður einsamoll á hesum økinum.

Tí er gleðiligt at nýtt uppskot til náttúruverndarlóg loksins verður sent til ummælis og vónandi ber á mál hesaferð at fáa lógina samtykta, so týðandi arbeiði at útfylla karmarnar í hesi lóg kann fara í gongd.

Ferðavinna og náttúruvernd
Greitt samband er millum náttúruvernd og ferðavinnu. At oki verða útnevnd verndaroki merkir nevniliga, at tað verður greitt tilskilað, hvussu økið verður vart m.a. við teimum umsitingarætlanum sum skulu gerast ísv. at oki verða vard. Hyggja vit at verndarokjum uttanlands, eru greiðar reglur um, hvussu vitjandi kunnu ferðast í økinum. At verja eitt oki merkir í flestu forum ikki, at fólk skulu halda seg burtur frá økinum. Tvørturímóti er greitt samband millum vitjan og vernd, tí tað er ein týðandi liður í verndararbeiðinum at kunna um tey náttúruvirði, sum verða vard, bæði so fólk eru tilvitað um, hví økið verður vart, samstundis sum fólk hava góða atgongd til at síggja og kunna seg um náttúrumargfeldni í økinum. Tað er gleðiligt, at lógaruppskotið eisini leggur upp til tað.

Í menningarætlanini fyri framtíðar ferðavinnu frá 2019 er stórur dentur lagdur á náttúruvernd. Millum annað staðfestir Visit Faroe Islands í menningarætlanini at "økkum torvar nýggja lóggávu, ið bæði tryggjar ábyrgdarfulla nýtslu og atgongd til okkara náttúru. Tað er bæði avgerandi og átrokandi, vilja vit halda fram at menna ferðavinnuna her á landi. Lóggávan er ein fortreyt fyri at seta í verk landsfevnandi skipanir, ið kunnu tryggja eina væl skipaða ferðavinnu við atliti at trygd, kunning og gjoldum. Vit mugu tryggja økkum, at føroyska náttúran verður verandi atkomulig og óspilt um somu leið, sum ferðavinnan mennist. Hetta er javnvágin, vit skulu finna og síðani varðveita."

Vit ynskja at virka fyri, at Føroyar vera undangonguland í burðardyggari ferðavinnustýring og náttúruvernd. Í dag eru vit eftirbátur, og vit hava í dag eina meiri ella minni tilvildarliga og reaktiva umsiting, hvat náttúrufriðing viðvíkur. Fremsta orsøkin er, at vit ikki hava ambodini at verja náttúruna. Tí er tað sera átrokandi, at vit samtykkja eina náttúruverndarlóg, ið er fyrsta stig at rokka málinum um eina burðardyggari umsiting av náttúru okkara.

Viðmerkingar til lógaruppskotið
Lógaruppskotið fortir í sær sjálvum ikki til náttúruvernd. Talan er um heimildarlóggávu ella rammulóggávu, ið setir karmin um arbeiði framyvir. Tað er ein veikleiki við uppskotinum, at ongar ítøkiligar verndarásetingar eru. Til dømis er upplagt at brúka hetta hovi til at gera yvirskipaðar ásetingar

the Faroe Islands

um virksemi í náttúruni, sum eydsæð er til skaða fyri bæði lendi og fuglalív. Mest upplagda domi er ATV-ferðsla uttanfyri bogarðarnar, ið alt fyri eitt átti at verið forbodin um alt landið. Annað domi eru ítokiligar ásetingar, sum forða fyri at grót, plantur og annað verður tikið úr náttúruni. FOnnur slík domi eru eisini

Tað er eisini ein veikleiki við lógaruppskotinum, at nærum allar verndarásetingar eru orðaðar sum meiri ella minni leysar heimildir, har "landsstýrismaðurin kann" áseta nærri reglur í kunngerð. Tá allar verndarásetingar eru grundaðar á avgerð landsstýrismansins er vandin, at tað vera politisk atlit heldur enn saklig, náttúruvísindalig atlit sum í síðsta enda avgera, nær friðingar verða framdar. Staðfest verður í almennu viðmerkingunum, at lógin í stóran mun er ein amboðskassi, "har ið tað veldst um politiska raðfesting og figging, hvussu og hvussu nógv amboðini verða brúkt". Hetta halda vit ikki vera noktandi við uppskotinum.

Afturat hesum inniheldur uppskotið fyrivarnisreglur og ásetingar um rímiligheit, ið ein kann stúra fyri vera brúktar sum grundgeving fyri ikki at seta í verk noktandi verndarátok. Orðingar sum "so langt tað er rímiligt", "miðast skal eftir" og "tá týðandi samfelagsáhugamál gera tað neyðugt" eru domi um orðingar, ið kunnu brúkast til at sleppa undan at seta náttúruverndina í hásæti, um onnur politisk atlit tala fyri tí. Hetta saman við lutfalsliga nógvum kunngerðarheimildum har "landsstýrismaðurin kann" áseta reglur ger, at lógaruppskotið í síni heild stendur ið so veikt.

Vit mæla til, at avgerðir um friðing í storri mun verða lagdar til fakmyndugleikan, so tað vera sakligar grundgevingar og kanningar sum avgera, nær friðingar ella onnur verndarátok verða settar í verk og ikki politisk atlit, ið oftani eru meiri stuttskygd og m.a. stýrd av atlitinum til jarðareigararnar ella onnur vinnulig atlit. Tað vísa royndirnar tíverri.
Heldur enn at landsstýrismaðurin er stigtakari, eftirlits- og kærumyndugleiki innan náttúruvernd, mæla vit til at avgerðir um friðing umframt eftirlitið verða logd til fakmyndugleikan, ímeðan landsstýrismaðurin einans er kærumyndugleiki á okinum, soleiðis sum §32 heimilar. Á tann hátt fáa vit eitt meiri miðvíst, fakliga stýrt verndararbeiði við armslongd frá politiska myndugleikanum. Tað meta vit er neyðugt, skal lógin fáa veruligan virknað.

Okisvernd
Fyri ferðavinnuna er tað serliga kapittul 4 í lógini, ið snýr seg um okisvernd, ið er viðkomandi. Ásetingarnar geva landsstýrismanninum heimild til í kunngerð at skipa ymisk slog av verndarokjum, bæði á landi og á sjógvi. Lógaruppskotið letur t.d. upp fyri, at stór náttúruoki kunnu verjast sum tjóðgarðar, eins og til ber at útnevna landslagsverndaroki, har tað er landslagið sum heild, ið verður vart. Eisini ber til at verja oki við sjáldsamari ella viðkvæmari náttúru, serligum jarðfroðiligum fyribrigdum ella á annan hátt einum týðandi náttúruvirði. Tað er ein styrki, at lógaruppskotið hevur moguleikan at skilja millum ymisk slog av verndarokjum.

Vit meta samanumtikið, at ásetingarnar um okisvernd er eitt gott og neyðugt amboð, sum fer at vera ein ágóði fyri Føroyar sum ferðafólkaland og fyri okkum sum búgva her, verða ásetingarnar nýttar skynsamt. Verður eitt oki í Føroyum til domis útnevnt sum tjóðgarður, leggur hetta afturat virðinum hjá Føroym sum ein ferðavinnutjóð, ið virðir og verjir síni náttúrugivnu virðir. Um sæð verður burtur frá sjálvsagda virðinum í at verja náttúru og djór, er tað eisini eitt virði fyri eina vaksandi ferðavinnu, at fleiri stoð í Føroyum verða útnevnd sum serlig verndaroki, tað veri seg orsaka av serligum landslagi, jarðfroði ella djóra- ella plantuslogum. Hetta er við til at fjoltátta og spjaða ferðavinnuna og kann hava við sær nýggjar

inntokur, beinleiðis og óbeinleiðis, samstundis sum hetta ásetir neyðugu avmarkingarnar fyri at varðveita serliga virði við okinum.

Tað hevur víst seg at vera ein stór avbjóðing at seta í verk noktandi verndartiltok og avmarkingar á serliga sárbærum okjum við stoði í galdandi lóggávu. Mykines og serliga lundalandið í Lamba er besta dømi um hetta. Í hesum fori eru longu gjordar fleiri kanningar, ið kunnu brúkast sum grundarlag undir eini friðing ella, við nýggju lógini, einum verndaroki. Hóast allir stovnar í Føroyum, sum í dag beinleiðis ella óbeinleiðis varða av náttúruvernd, hava mælt til at seta friðingar í verk, og at Yvirfriðingarnevndin við stoði í tilmælunum frá Havstovuni, Umhvørvisstovuni, Tjóðsavninum og Visit Faroe Islands í apríl 2021 heittu á landsstýrismannin um at seta í verk kunngerð um friðing, so er framvegis onki hent í málinum. Tað er okkara vón, at tað við nýggju ásetingunum um serlig verndaroki, ber til at seta inn við serligum verndarátokum, sum bæði kunnu verja fuglin og náttúruna, men sum eisini kunnu vera við til at skipa ferðavinnuna betri. Hetta eru viðurskifti sum væl kunnu ganga hond í hond.

Verður nýggja náttúruverndarfyrisitingin hinvegin ikki raðfest við eini noktandi fígging og verður tað framvegis "ein politisk avgerð" um verndaroki verða útnevnd, er vandin, at tað eru lang útlit til at slík verndaroki verða veruleiki. Enn einaferð mugu vit tiskil leggja áherðslu á, at noktandi fígging og ein fakliga sterk og politiskt óheft fyrisiting er altavgerandi, skal lógin verða eitt amboð til at fremja munagóða náttúruvernd og harvið eisini eitt amboð til at tryggja eina burðardygga ferðavinnu sum frá líður.

Í serligu viðmerkingunum til § 20 um tjóðgarðar stendur sum rætt er, at fólk í oldir hava lagt slóð eftir seg í føroysku náttúruni og at tað kann vera neyðugt at seta í verk varsama tilbúgving til ferðavinnu. Við varsamari tilbúgving til ferðavinnu meinast sbrt. viðmerkingunum tiltok sum t.d. at gera farleiðir sjónligar og moguliga broyta brúkið av verandi bygningum.
Hetta er at froast um, og vit vóna, at oki í Føroyum verða útnevnd sum m.a. tjóðgarðar, so farast kann undir arbeiði at verja náttúruna og at skipa ferðsluna í hesum okjum. Tað ber ikki til við verandi lóggávu, har tað er upp til meiri ella minni tilvildarligar einstaklingar at gera av, hvor vernd fer fram, og hvussu ferðslan í okinum verður skipað.
Undir sama broti stendur eisini, at "ferðavinnustoðir skulu ikki vera inni í tjóðgarðum." Nærri verður ikki komið inn á, hvat sipað verður til, tá tað snýr seg um "ferðavinnustoðir". Uttanlands er vanligt at sonevnd "visitor centres" ella móttokubygningar eru at finna inni í tjóðgarðum og verða slík stoð vanliga brúkt sum portur inn í ein tjóðgarð, har tað eitt nú ber til at keypa útferð við ferðaleiðara, keypa kort yvir okið og har til ber at geva ferðafólki kunning um staðið, tey eru í ferð við at fara inn í. Hetta er skilagott, eftirsum tað er eitt amboð til at skipa ferðsluna, at geva ferðafólki kunning og til at skapa inntokur, ið fara til at rokja tjóðgarðin. Er slíkt "visitor centre", ið vanliga verður rikið av náttúrufakliga myndugleikanum, at fata sum ein ferðavinnustoð? Ella er eitt útsýnisstað, t.d. skjól ið verður brúkt til at hyggja eftir fugli, at fata sum ein "ferðavinnustoð"?
Um so er, mæla vit til at hesin setningur verður strikaður. Um ikki, mæla vit til, at tað verður nágreinað, hvat fellir undir eina "ferðavinnustoð" og at grundgivið verður fyri, hví slíkar stoðir ikki eru loyvdar.

Verksetanin
Lógaruppskotið gevur ikki innlit í, hvussu landsstýrið sær fyri sær, at arbeiðið at skipa umsitingina og at fara undir kortleggingar- og kunngerðararbeiði kann leggjast til rættis. Visit Faroe Islands metir, at tað hevði styrkt uppskotið, um tað gav greiðari ábending um, hvussu lógin um náttúruvernd skal setast í verk og hvussu umsitingin skal skipast. Hetta soleiðis at ein nýggj fyrisiting í storri mun kann brúka lógina

sum grundarlag undir arbeiðssetninginum, tá farast skal undir at skipa stóra náttúruskrásetingar – og kortleggingararbeiði, ið liggur fyri framman. Tá ein torvsmeting og ein ætlan fyri íverksetanina er gjord, ber til at staðfesta neyvari, hvorji starvsfólk torvur er á og hvussu arbeiði frameftir skal raðfestast. Okkum vitandi er slík torvsgreining ikki gjord og tí er kanska ov tíðliga at siga, at torvur er á 4 nýggjum akademiskum starvsfólkum, harav tvey skulu vera logfroðingar, serliga tá lógaruppskotið samstundis staðfestir, at tað er ein fortreyt fyri at lógin kann fáa virknað, at neyðugu náttúrufakligu skrásetingarnar verða framdar.

Vit mæla sjálvandi til at raðfesta menningina av eini sterkari fakligari umsiting í Umhvørvisstovuni við rottu forleikum.. Vit mæla til, at munandi storri figgjarlig orka verður sett av til hetta arbeiði enn tað sum uppskotið leggur upp til, so vit skjótari kunnu flyta okkum úr stoðuni sum eftirbátur innan náttúru- og umhvørvisvernd. Visit Faroe Islands metir ikki, at tað er nóg mikið við eini fakligari náttúrufyrisiting á trý starvsfólk, meina vit náttúruverndina í álvara

Náttúruverndargjaldið kann vera lykilin

Náttúruvernd og ferðavinna hanga sum nevnt óloysiliga saman. Tað er náttúran, ið er tilfeingið hjá ferðavinnuni, og tí hevur ferðavinnan beinleiðis áhuga í at verja hetta tilfeingið – tað er bara soleiðis, vinnan kann vera burðardygg. Eitt av hovuðsendamálunum í menningarætlanini hjá Visit Faroe Islands er at brúka ferðavinnuna sum amboð til at fremja náttúruvernd í verki. Og tað er eisini kjarnin í uppskotinum vit logdu fram í 2019 um at áseta eitt náttúruverndargjald á oll ferðafólk sum koma til Føroyar.

Endamálið við náttúruverndargjaldinum er nettupp at fáa til vega neyðugu figgingina til at gera stoðumetingar, árinskanningar og til at kortleggja føroysku náttúruna, so vit hava eina nógv betri vitan um, hvør stoðan er í føroysku náttúruni og harvið eisini, hvørji verndarátak eru neyðug.

Vit skjóta eisini upp, at alt landið verður nágreiniliga skrásett og kortlagt, so vit kunnu staðfesta, sakliga, hvørjar farleiðir eru tær bestu at vísa ferðafólki á. Soleiðis kunnu vit eisini staðfesta, at summi oki eru, har tað er ein treyt at gingið verður saman við staðkendum ferðaleiðara, t.d. í brottum og vandamiklum lendi ella á lendi, ið er serliga sárbart. Aðrastaðni eiga oki at vera stongd av náttúru- ella djóraverndarfyrilitum, o.s.frv.

Vit ímynda okkum, at nýggja náttúruverndarumsitingin verður týðandi partur í arbeiðinum at skipa ferðsluna í náttúruni við neyðugu gonguleiðunum og betri kunning um náttúruríkidomi.

Siga vit, at oll útlendsk ferðafólk skulu at rinda 100 kr. í náttúruverndargjaldi, er árliga inntokan uml. 12 mió. kr. Vit mæla til at bróðurparturin av hesi inntokuni fer beinleiðis til náttúruna, t.e. bæði at seta í verk neyðuga kanningararbeiði, ið kann vera grundarlag undir eini munadyggari náttúruumsiting, til at gera umsitingarætlanir og til at seta verulig verndartiltok í verk sbrt. ásetingunum í lógini við noktandi umsitingarætlanum og eftirliti.

Vit mæla til, at politiski myndugleikin tekur hetta uppskot til eftirtektar og setur slíkt avgjald í verk, oyramerkir inntokuna til náttúruvernd og á hendan hátt setir ferð á náttúruverndararbeiði.

the Faroe Islands

Niðurstoða

Lógaruppskotið inniheldur fleiri heimildir og góð verndarramboð til gagns fyri føroysku náttúruna og harvið eisini ferðavinnuna. Lóggávan er heilt greitt eitt stig á rottu leiðini, og tí taka vit undir við uppskotinum við teimum viðmerkingum, ið eru omanfyri.

Tó skal eisini gerast vart við, at torvur er á fleiri átokum, áðrenn til ber at siga, at vit eru komin á mál. Millum annað er stórur torvur á lendislóggávu og dagfordari jarðarlóggávu, ið skipar ferðsluna í haganum. Hetta er grundleggjandi, vilja vit eina væl skipaða ferðavinnu í Føroyum. Vónin er tí, at hetta bara er fyrsti liður í eini storri tilgongd at skipa náttúruumsiting, lendisnýtslu og jarðarlóggávu betri.

Vinaliga

Guðrið Hojgaard, stjóri